# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Viðurskiftini millum okkum og Russland eru nakað kaldlig, men ikki sum kalt kríggj*

*Condoleezza Rice*

# Breti tikin í sambandi við burturflyting



*Um alt Bretland hanga plakatir av Madeleine McCann. Hendan hongur í skotska býnum Glaggow*

**Portugisiska løgreglan hevur tikið ein breta, sum er settur í samband við Madeleine McCann, sum bleiv burturflutt fyri 12 døgum síðani**

- Hann er ósekur. Tað eru fjølmiðlarnir, sum hava tengt hann at burtuflytingini og spunnið eina søgu, sigur Sally Eveleigh við Sky News.

Hon er systkinabarn mannin, sum portugisiska løgreglan handtók í gjár. Maðurin, sum er breti, hevur búð í Praisa Da Luz í Portugal, har hann hevur egin hús. Tey eru bara einar 130 metrar frá staðnum, har tann fýra ára Madeleine McCann bleiv burturflutt tann 3. mai. Løgreglan rannsakaði øll húsini, eftir at bretin var tikin, og svimjihylurin uttanfyri bleiv tømdur, sigur Sky News.

Tað var ein bretskur tíðindamaður, sum mælti portugisisku løgregluni til at kanna viðurskiftini hjá bretanum. Tíðindamaðurin, sum arbeiðir hjá blaðnum Sunday Mirror, hevði tosað við bretan, og hann helt mannin brúka eitt heldur sjáldsamt orðalag, tá teir tosaðu um ta burturfluttu gentuna. Tí mælti hann løgregluni til at tosa við mannin.

Á Sky News eru tey eitt sindur ørkymlað av, at maðurin er tikin, tí sjónvarpsstøðin hevur brúkt hann sum tulk í Portugal, síðani Madeleine McCann hvarv. Harafturat hevur portugisiska løgreglan ofta brúkt hann sum tulk í sambandi við sama mál.

Nú er hann sjálvur settur í samband við burturflytingina.

# Indiánararnir ilskast inn á pávan

Benedikt pávi, sum er á vitjan í Brasil, hevur fingið øði í teir brasilsku indiánararnar.

Teir brasilsku indiánararnir eru illir um, at pávin á einum fundi við suðuramerikanskar kirkjuleiðarar hevur sagt, at upprunafólkið í Suðuramerika tók sjálvboðið við kristnari trúgv. Eingin noyddi tey at taka við trúnni, segði Benedikt pávi.

- Innast inni longdist teimum eftir kristindóminum, og tey tóku væl ímóti teimum kristnu trúboðarunum, segði pávin á fundinum við kirkjuleiðararnar.

Hendan tulkingin av søguni er fallin temum brasilsku indiánarunum fyri bróstið. Í einari kunngerð siga teir, at orð pávans eru merkt av hásinni og vantandi virðing.

Fleiri milliónir indiánarar lótu lív, tá evropeararnir løgdu Suðuramerika undir seg í 16. øld, og tann katólska kirkjan styðjaði hjálandapolitikkin.



STUTT SAGT

## Tilnevnt eftirmann

Taliban-rørslan í Afghanistan viðgekk um vikuskiftið, at ein av hennara fremstu leiðarum, mullah Dadullah, var deyður, men rørslan gjørdi vart við, at deyði hansara fer ikki stórvegis ávirkan á virksemið hjá rørsluni. Samstundis bleiv fráboðað, at ein bróðir mullah Dadullah hevur játtað at taka við. Hann eitur Bakht Mohammed. Talsmaðurin hjá ovasta leiðaranum í Taliban, Mohammed Omar, segði í gjár, at fleiri túsund heilagir stríðsmenn hava játtað at stríðast fyri tí nýggja leiðaranum.

## Fá fáa hjálp

Fleiri hundraðtúsund fólk eru flýdd undan hørðum bardøgum í somaliska høvuðsstaðnum Mogadishu og hava tørv á mati og aðrari hjálp. ST og fleiri hjálparfelagsskapir hava sent fólk og útgerð til Somalia, men ST sigur, at bara ein triðingur av teimum neyðstøddu fáa nakra hjálp. Trupulleikin er, at teir stríðandi partarnir vilja ikki loyva hjálparfólkunum at koma teimum neyðstøddu til hjálpar, og í so máta er støðan í Somalia verri enn í sudanska landspartinum Darfur, sigur ST. Bardagarnir í Mogadishu eru teir harðastu seinastu 16 árini, og hildið verður, at teir hava kostað umleið 1.300 mannalív.

## Herurin skal brúkast

Síðani seinna heimsbardaga hevur japanska grundlógin forðað fyri, at landið kann senda hermenn uttanlands, men nú er líkt til, at hetta verður broytt. Í gjár samtykti yvirhúsið í tjóðartinginum at broyta grundlógina, so japanskir hermenn kunnu taka lut í altjóða tiltøkum so sum friðarvarðveitandi arbeiði. Fyrr hevur undirhúsið tikið somu støðu, og ætlanin er nú at leggja spurningin fyri japanska fólkið á einari fólkaatkvøðu.